## VIÐMERKINGAR

# Skálafjarðartunnilin, trygdin í hásæti

**Viðmerking til greinina hjá Rúnu Sivertsen á Portalinum 27.11.2005 viðv. trygdini í Skálafjarðartunlunum**

**Alfred Olsen**
*løgtingsmaður fyri Sambandsflokkin*



Tað gleddi meg, sum ein av fyrireikarunum til tann almenna fundin á Svangaskarði av framløguni av Skálafjarðartunlunum, at síggja forkvinnuna í Ráðnum fyri Ferðslutrygd koma á fundin, og sjálvandi fekk hon pláss í fremstu røð.

**Møguleiki at spyrja.**
Tá tann professionella framløgan av prosjektinum var liðug og landsstýrismaðurin hevði havt orðið, var møguleiki hjá øllum, kanska burtursæð frá løgtingsmonnum, at spyrja um hvat tað skuldi vera viðv. tunnilsprosjektinum, vegaføringini og ferðsluni.
Nøkur fundarfólk nýttu hetta høvið og fingu svar, men røddin hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd var kvirr og tað tók eg sum eitt positivt signal um góðkenning av hesum spennandi prosjekti.

**Ráðið fyri Ferðslutrygd.**
Men nú sunnudagin boðar Rúna Sivertsen frá, at Ráðið fyri Ferðslutrygd hevur skrivað til Løgmann (hví løgmann?) og Bjarna Djurholm viðv. Skálafjarðartunlunum, tí hon bæði øtaðist og var skelkað av, at ongin hevði spurt um trygdina á fundinum. Men hví spurdi Rúna Sivertsen ikki um trygdina?.
Eg vóni ikki, at Ráðið fyri Ferðslutrygd heitir á løgmann og landsstýrismannin, við tí fyri eyga, at steðga tunnilsprosjektinum? Tá eg hugsi um tað øking í ferðslutrygdini, tað stóru tíðarsparingina, minni dálking av umhvørvið, nógv minni oljunýtslu, minni slit av vegnum o.s.v. hesin tunnilin viðførir fyri ferðsluna í Føroyum.
Eg vóni ikki, at hetta átak hjá forkvinnuni í Ráðnum fyri Ferðslutrygd, er gjørt fyri at markera hana sjálva, tí til tað er prosjektið alt ov týðandi, fyri at økja um ferðslutrygdina í Føroyum, og tí fari eg at heita á Ráðið fyri Ferðslutrygd, um at arbeiða saman við Skálafjarðartunnlunum, fyri at fáa prosjektið so fullkomið sum gjørligt.

**Null-hugsjónin**
Eg eri ikki í iva um, at trygdin í Skálafjarðartunlunum, sum er sett í hásæti, og eftir strongu norsku ásetingunum, vil vera við til, at vit koma nærri null-hugsjónini, um at ongin í Føroyum skal láta lív í ferðsluni, og tí heiti eg á Ráðið fyri Ferðslutrygd, um at samarbeiða í staðin fyri at mótarbeiða.

# Upp um dalar, gjøgnum fjøll

**Jørgen Niclasen**



Góðar og breiðar vegir ynskja vit til koyra skjótt, samstundis sum vit ynskja forðingar fyri at tryggja lítla fer.
Taki fult undir við Rúnu Sivertsen, form. í ráðnum fyri ferðslutrygd um at ferðsla gjøgnum bygt øki eigur at tálmast.
Tað eigur ikki at verða framtíðin, at landsvegur við nógvari ferðslu koyrir gjøgnum bygt økið. Heldur enn at seta alskyns forðingar upp, eiga vit, har tað ber til, at leggja landvegaferðslu uttan fyri bygt økið. Dømi um hetta er orðaskifti sum nú er um vegaføringina gjøgjum/undir/omanfyri Leirvik, har trygdin eigur at hava stóra ávirkan á avgerðina.
Annar táttur í trygdini eigur at verða teir farvegir, ið eru í fjøllunum,ofta í brøttum. Har er veturin ein vansi fyri trygdini. Vit eiga í framtíðini at fáa vegirnar so lágt sum møgulig. Sum dømi kunnu nevnast Kaldbakstunnilin, tunnil Øravik/Hov og ynski hjá Vestmenningum um tunnil fyri at sleppa undan at koyra í hæddini.

**Oyragjógv/Vatnsoyrar**
Vestri í Vágum hava vit báðar hesar vansar. Nógv Ferðsla gjøgnum Miðvág og Sandavág, umframt kavahæddini á Hálsi (niðanfrá Oyragjáarbrekkuni). Vit kunnu gera ferðsluforðingar fyri at minka um ferðina ella gerða vegir omanfyri bygdirnar, men tað verða ongantíð meir enn næstbestu loysnirnar.
Fyri nøkrum árum síðini kom Jóanis Nielsen við einum sera áhugaverdum uppskoti um tunnil. Framtíðin vestri í Vágum eigur at verða ein tunnil av Oyragjógv til Vatnsoyrar. Vit sleppa undan ferðslu gjøgnum bygt øki og vit sleppa undan brekku og hæddum. Harafturat verður t.d. tíðin úr Tórshavn vestur á flogvøllin minka niður um 30 minuttir.
Tað er eisini vert at nevna at ætlaða leingingin av flogvøllinum krevur nógv grót. Hugsa vit um hvar hetta grót skal koma frá, er grót úr slíkum tunnli betri loysn, enn at spreingja stór beni í fjallið. Umframt er peningur at spara um báðar íløgurnar verða gjørdar samstundis.
Vit eiga at hugsa meira um trygd, tá vit taka avgerðir um framtíðar ferðslu.

# Setið ikki donsku lógina um felags foreldramyndugleika í gildi í Føroyum

**Hví ætlar samgongan at samtykkja ta donsku lógina um felags foreldramyndugleika, tá danir sjálvir ásanna, at hon ikki er nóg góð og vilja broyta hana?**

**Theodor E. D. Olsen**



Dagur og vika bar í seinastu viku tey tíðindi, at Jógvan við Keldu, innlendismálaráðharri, ætlar at seta ríkislógartilmæli í gildi um felags foreldramyndugleika. Sambært Degi og viku vóru framsøgufólk úr samgonguni samd um hetta, og andstøðan varð als ikki spurd.
Danska løgmálaráðið sendi í 2002 eitt uppskot til føroysku myndugleikarnar um dagføringar av gomlu myndugleikalógini at taka støðu til. Uppskotið er bygt á donsku lógina um "Forældremyndighed og samvær" frá 1995, og tað er hetta uppskot, sum samgongan sigur seg ætla at seta í gildi fyri Føroyar.
Men hví skulu vit júst seta ta donsku lógina um felags foreldramyndugleika í gildi í Føroyum, tá onnur lond eru komin munandi longri á hesum øki enn Danmark? Hví ætlar samgongan ikki heldur at arbeiða fram ímóti at yvirtaka hetta málsøkið, tá hon hevur sett sær fyri at yvirtaka onnur málsøki í hesum valskeiðnum, so ein føroysk lóg kann gerast? Er tað tí, at ov nógv sokallað "etisk mál" eru blandað upp í familjulóggávuna, og tí ikki kunnu viðgerast flokspolitiskt og enn minni yvirtakast sum ein heilur pakki?
Og hví kannar Dagur og vika ella aðrir fjølmiðlar ikki, hvussu lógin um felags foreldramyndugleika roynist í Danmark? Hetta kundi verið hent at vitað, um ætlanin hjá føroyingum er at kopiera hana.
Eitt nú hevði borið til at spurt Foreningen Far ella farið inn á heimasíðuna hjá teimum ella øðrum áhugafelagsskapum, ið stríðast fyri rættindum hjá pápum og børnum teirra í Danmark, og frætt, hvat hesi halda um lógina.

**Bøtir ikki um javnstøðuna**
Í Danmark er tað so, at um foreldur ikki eru gift, skal mamman skriva undir, um foreldrini skulu hava felags foreldramyndugleika. Longu her koppar javnvágin millum mammu og pápa, tí um mamman noktar, hevur hon foreldramyndugleikan einsamøll. Eisini um tey búgva saman.
Um foreldrini seinni velja at fara frá hvørjum øðrum, kann annar parturin tó velja at leggja sak og krevja allan foreldramyndugleikan.
Sambært núverandi donsku lógini, sum samgongan ætlar at samtykkja, hevur dómarin í slíkum førum ongan møguleika at døma felags foreldramyndugleika, hóast bæði foreldrini verða mett at vera egnað sum foreldur. Hevur annar parturin stevnt, er talan um antin ella.
Slíkar sakir kunnu tí vera sera torførar at avgera hjá einum dómara, sum skal meta um, hvat er best fyri barnið. Dómarin hevur tí møguleika at bjóða mekling sum eitt alternativ, men bert um báðir partar ynskja hetta. Um annar parturin ikki ynskir mekling, skal dómur fellast.
Í øðrum londum enn Danmark ber hinvegin til at lata bæði foreldur varðveita foreldramyndugleikan, um tey verða mett at vera egnað foreldur.
Tí haldi eg tað vera av alstórum týdningi, at føroyingar ikki fara at kopiera ta núverandi donsku lógina, av tí at hon eftir mínum tykki bert er eitt eiti og ikki nógv frægari enn lógin frá 1922, sum er í gildi í Føroyum í dag. Hetta sigi eg, tí danskir pápar, ið tapa nærum 80 % av slíkum rættarsakum, mugu sigast at vera eins illa staddir og teir føroysku páparnir, sum heldur ikki hava møguleika at fáa felags foreldramyndugleika yvir teirra børnum í Føroyum í dag. Munurin er bara, at í Danmark verða fleiri pápar ofta dømdir til at missa felags foreldramyndugleikan, hóast teir av dómaranum verða mettir sum egnað foreldur.
Og tá er spurningurin, um tann felags foreldramyndugleikin sambært donsku lógini frá 1995 er nøkur trygd, um partarnir velja at fara hvør til sítt. Hon bøtir í øllum førum ikki upp á javnstøðuna millum kynini, sum var eitt av argumentunum hjá m.ø. umboði Javnaðarfloksins fyri at seta ta donsku lógina í gildi í Føroyum. Hon bøtir heldur ikki um rættartrygdina hjá børnunum og rætt teirra at kenna bæði síni foreldur.
Danir ætla at broyta lógina, sum samgongan ætlar at seta í gildi.
Tí áttu vit heldur arbeitt fram ímóti at yvirtikið familjurættarlóggávuna, so vit sjálv kundu dagført lógir á økinum.
Í hesum sambandi áttu føroyingar heldur at hugt eftir lógunum í t.d. Svøríki,
Norra, Íslandi og Týsklandi, har tað m.a. ikki ber so væl til at døma fólk til ikki at hava felags foreldramyndugleika, um bæði eru egnað sum foreldur. Tá høvdu børnini havt rætt til bæði síni foreldur, og bæði foreldrini havt skyldur mótvegis sínum børnum.
Í Danmark verður í hesum døgum kjakast á politiskum stigi um at broyta hesa lógina, sum føroyingar ætla at samtykkja.
Flestu flokkar ásanna, at verandi danska lóg ikki er nóg góð, og konservativi danski familjumálaráðharrin, Lars Barfoed, hevur sett eina nevnd at kanna, um danska lógin er tíðarhóskandi.
Eisini kann nevnast, at í t.d. Svøríki kann ein sak av slíkum slagi vara einar tvær vikur at avgreiða í rættinum. Í Danmark tekur hon bert tveir tímar.
Somuleiðis hava røddir í Føroyum verið frammi um, at tað átti at verið barnasakkøn ráðgeving hjá Ríkisumboðnum. Men tað er kortini avmarkað, hvussu nógv ein samtala í hálvan annan tíma kann geva foreldrum. Har skal meira til, og er hetta aftur eitt dømi um, at Danmark eftir mínum tykki ikki eigur at vera fyrimynd, tá lógir um familjurætt skulu smíðast í Føroyum.
Tí sum so er ikki tann stóri munurin, um ein lóg er frá 1922 ella 1995. Tað er innihaldið í henni, sum telur.